# ítróttur

Nr. 198 • týsdagur • 18. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rúni skal venja AB

**Eftir øllum at døma skal HB-liðformaðurin komandi ár venja AB, og sum skilst, so fær hann kanska hjálp frá Allani Mørkøre í hesum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Enn eru boðini ikki almenn, men tað skuldi verið heilt víst. Rúni Nolsøe, sum er maðurin við dystarmetinum í HB, og sum hevur verið liðformaður til seinastu fýra FM-heitini hjá HB, fer næsta ár at royna seg sum venjara hjá AB.

Boðini verða ikki váttað alment. Hvørki frá Rúna ella frá felagnum sjálvum. Einasta viðmerkingin í so máta er frá formanninum í AB, Tórálvi Stenberg. Hann vil ikki siga nakað sum helst um, hvør tað verður, sum skal stýra besta liðnum hjá felagnum komandi ár, men hann váttar, at tann spurningin helst verður greiddur mánakvøldið.



*Eftir øllum at døma fer Rúni Nolsøe at spæla sín seinasta fyrstudeildardyst í hesum umfarinum, tá HB leygardagin skal dystast við B36. Eftir hetta verður tað í venjarayrkinum, at Rúni fer at royna seg*

Og tað samsvarar eisini við tær upplýsingar, sum vit her á blaðnum hava fingið um málið.

Og sum skilst, so verður Rúni Nolsøe ikki einsamallur nýggjur maður í AB. Afturat sær hevur hann nevnliga fingið hjálp frá einum fyrrverandi liðfelaga, sum tó verður millum argastu kappingarneytarnar komandi leygardag.

Allan Mørkøre tykist í ár at spæla sítt seinasta ár í toppinum av føroyskum fótbólti, og sambært tí, sum vit hava fingið upplýst, so verður hann eisini nýggjur maður í AB komandi ár.

Mánakvøldið er so dagurin, tá avtalurnar hjá teimum báðum verða undirskrivaðar, men áðrenn tankarnir fara at ferðast alt ov langt, so er tó eitt annað mál, sum teir báðir vinmenninir skulu avgreiða. Við oddastríðnum í Formula-deildini í mentu eru ikki ráð til at lata kenslur og vinskap koma ímillum, tá teir leygardagin spæla sín seinasta dyst í toppinum av føroyskum fótbólti í hesum umfarinum. Og einki er at ivast í, at teir báðir ynskja sær júst somu fráfaringargávuna.


Hagstova Føroya kunnger øll hagtøl á internetinum - heldur enn í pappírsútgávum. Á heimasíðu okkara **www.hagstova.fo** er eitt leitiamboð og ein datagrunnur - HAGTALSGRUNNUR - sum vit nevna hann. Her finnur tú øll hagtølini um landið tú býrt í og fólkini tú býrt her saman við.



DUGIR TÚ AT BRÚKA HAGTALSGRUNNIN?

Í november fer Hagstovan at bjóða fram skeið um at brúka hagtalsgrunnin - eitt amboð at velja sær hagtøl av heimasíðuni hjá Hagstovuni.

Í hagtalsgrunninum goyma vit hagtølin, so at brúkarin fær ríkar møguleikar at velja sær tað hann vil síggja. Skipanin loyvir tær at taka tey valdu hagtølini fram í ymsum sniðum, eitt nú sum Excel-ark ella í teigamarkaðum sniði. Haraftrat kanst tú snúgva talvunum alt eftir, hvat tú vilt hava standandi í vinstra teigi og í talvubreddanum. Tú kanst eisini gera samanteljingar av ymsu greiningunum.

Skeiðið verður í teldustovuni hjá Fíggjarmálaráðnum. Um áhugin er nóg stórur, verður skipa fyri trimum skeiðum. Pláss er fyri 9 fólkum hvørja ferð.

Skeiðið verður týsdagarnar 8., 15. og 22. nov. 2005, kl. 09.00-12.00.
Kostnaðurin er 250 krónur.

Tilmelding fer fram á tel 352800 ella við at senda t-post til **hagstova@hagstova.fo** seinast 26. okt. 2005.

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TEL +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO



PM

**Skrivstovunæmingur**

Ert tú ágrýtin, virkin, fyrikomandi og hevur hægri handilsskúlaprógv? So ert tú kanska tann heilt rætti/rætta at byrja sum skrivstovunæmingur á heilsølu okkara.

Starvsøkið er í høvuðsheitum kundatænasta og telefonsøla umframt bókhald og annað skrivstovuarbeiði. Lærutíðin er 2 ár. Lønin er sambært sáttmála við S&K.

Um hetta hevur vakt tín áhuga, send eina skrivliga umsókn við møguligum váttanum/prógvum til P/f Poul Michelsen, Hoyvíksvegur 79, FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 1. november 2005. Ætlanin er, at tú byrjar beinanvegin.

Vinarliga vend tær til Sólrún Michelsen, stjóra, ella Niels Juel Arge, fíggjarstjóra, á tlf. 314650, um tú hevur spurningar.

**P/f Poul Michelsen**

P/F Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1972. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. PM er skipað í 5 deildir: Søludeild, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og bildeild. Umleið 50 fólk starvast hjá PM.